Ingibjørg Berg nýggjur skrivari í Kommunusamskipan Føroya

Kommunusamskipan Føroya hevur Ingibjørg Berg í Havn í starvið sum skrivari og samskipari.

Hon tekur við starvinum 1. februar

Ingibjørg Berg er er útbúgvin Cand. Scient Pol., starvast í løtuni á Løgmansskrivstovuni og hevur annars starvsroyndir frá m.a. Fróðskapasetri Føroya, Granskingarráð Føroya, Oljufyrisitigini, Amnesty Iinternational, Føroya Deild og Líkningarráð Føroya.

10 umsóknir vóru til starvið.

Tøkk

Øllum tykkum, sum gjørdu mær 80 ára føðingardagin 5. juni so hugnaligan, takki eg hjartaliga og ynski øllum – familju, vinum kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

Blíðar heilsanir
Maria Rasmussen, í Miðvági

Tøkk

Hjartans tøkk øll tit, sum sýndu hjálpsemi og samkenslu, tá

Marianna Jacobsen

góða mamma, vermamma og omma okkara, doyði og varð jarðað.

Takk fyri kransar, blómur, gávur til Vágs kirkju og aðrar heilsanir og takk øll tit, sum fylgdu.

Vit ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt signað nýtt ár.

Kærar heilsanir
Marjun, Elsmaria og Mortina við familjum

Flyttemand Olsen

James Olsen framman fyri flutningsbilinum, hann hevur keypt, til nýggja flutningsfelagið, Faroe Trans

Mynd: Jens Kristian Vang

FLUTNINGUR
Eirikur Lindenskov

Nei, vit tosa ikki um Húsið í Christianshavn…

Men um James Olsen, sum seinastu árini fyri tað mesta hevur gjørt um seg sum tónleikari og sangari.

Hann hevur nú stovnað flutningsfelag.

– Vit fara at flyta allar vørur og lutir og alt, ið flytast kann – bæði fyri virki og stovnar og privatfólk, sigur James Olsen, sum leggur afturat, at tey ætla at veita kundunum eina persónliga tænastu so góða sum til ber.

– Vit fara tískil ikki at lova meira, enn vit kunnu halda, so um fólk hava brúk fyri okkum, so er bara at ringja, sigur James Olsen.

Freestylers í Badmintonhøllini

Komandi vikuskifti verður freestylers kappingin aftur í Badmintonhøllini í Havn

UNDIRHALD
Ingrid Bjarnastein

Freestylers kapping verður aftur í Badmintonhøllini í Havn leygardagin 21. desember. Tey, sum ikki vita, hvat Freestylers er fyri nakað, skulu her fáa at vita, at tað í veruleikanum ikki er nøkur kapping, men eitt tiltak, har áskoðarin sjálvur skal gera av, hvat hendir.

Onkur luttakari velur at sýngja eitt karaoke lag, og onkur annar eitt sokallað playback lag. Onkur fer á pallin bara fyri at "flippa út". Við øðrum orðum snýr hetta tiltakið seg um at hava tað stuttligt.

Komandi vikuskifti verður aftur freestylers kapping í Badmintonhøllini. Tiltakið byrjar hesuferð klokkan 21.30 og endar klokkan 2. Aldursmarkið er 14 ár.

Bussur koyrir nú beinleiðis úr Vágunum og eisini úr Vestmanna.

Strandferðslustjórarnir hittust

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni á fyrsta fundinum við komandi Strandferðslustjóran, Kristian Davidsen
Mynd: Álvur Haraldsen

Týsdagin hittust teir báðir Reidar Nónfjall, núverandi Strandferðslustjóri og Kristian Davidsen, komandi stjóri

STJÓRASKIFTI
Ingrid Bjarnastein

Tann 1. januar 2003 tekur Kristian Davidsen við sum nýggjur Strandferðslustjóri. Hann tekur yvir tá Reidar Nónfjall verður loystur úr starvi.

– Vit gjøgnumganga Strandferðsluna í dag. Bygnaðin, fíggjarstýring, starvsfólkaviðurskifti, tænastu og annað. Vit hava eina drúgva skrá, sum vit skulu hava ígjøgnum, segði Reidar Nónfjall fyrrapartin í gjár.

Hetta er fyrsta ferðin teir báðir hittast. Kristian Davidsen flutti heim úr Svoriki leygardagin.

– Eg fari undir hetta starvið við góðum treysti. Hetta er ein ógvuliga spennandi avbjóðing, sigur Kristian í stuttari viðmerking við Sosialin.